


*Her á Hoyvíksvegnum verða seinastu loftlinjurnar nú tiknar niður og kaðal í staðin lagdur í gongubreytina*

Mynd: Jens Kristian Vang

# Seinastu linjurnar falla

**BÝARMYND FER** Í hesum døgum taka menn frá SEV seinastu linjurnar niður í Tórshavnar kommunu. Tær eru á strekkinum Essalág niðan móti fyrrverandi Rúsuni á Hoyvíksvegnum

Leo Poulsen

Tíðin og menningin fer við øllum. Soleiðis er eisini við gomlu loftlinjunum hjá SEV. Seinasta strekkið við hesum linjum í Tórshavnar kommunu er á Hoyvíksvegnum frá Essalág niðan móti bygninginum hjá Vinnuframagrunninum, har Rúsan helt til áður.

Samstundis sum loftlinjurnar verða tiknar niður, verður kaðalur lagdur í gongubreytina.

Jón Nielsen, leiðari á rakstrardeildini hjá SEV, sigur, at tá teir eru lidnir í Havn at taka loftlinjurnar niður, eru bert Tvøroyri og Norðoyri, sum framvegis hava loftlinjur.

Arbeiðið verður gjørt so líðandi, og í 2013 verða seinastu loftlinjurnar tiknar niður á Tvøroyri, og tá verða allar 0,4 KV loftlinja eftir í landinum, sigur Jón Nielsen.

Tað var serliga eftir jólaódnina í 1988, at ferð kom á niðurleggingina av loftlinjunum í Føroyum. Ódnin fór somikið illa við bæði lágspennings- og háspenningslinjunum, at neyðugt varð at endurnýggja stórar partar av kervinum.

Jón Nielsen sigur, at fleiri viðurskifti gjørdu seg galdandi, tá ið valt varð at leggja kaðalar ístaðin fyri at byggja nýggjar luftlinjur í bygdum og býum. Til dømis veitingartrygdin, persónstrygdin og umhvørvið.

Arbeiðið við at leggja 10 og 20 KV kaðalar millum bygdir og býir er eisini komið væl áleiðis. Ætlandi verður komið á mál við hesum arbeiði um 7-8 ár, sigur Jón Nielsen.

Arbeiðið at kaðalleggja kring landið verður gjørt í neyvum samstarvi við kommunu- og landsmyndugleikarnar í teimum økjum, har arbeitt verður.

leo@sosialurin.fo

# School's out for summer

**Í dag enda flestu skúlar árið, og væl verður gjørt burtur úr, summastaðni meira enn aðrastaðni**

Leo Poulsen

Tað var tann tíð, tá endin á skúlaárinum varð markeraður við einum árskarakteri og so kanska ein kaffimunn til foreldrini. Men soleiðis er ikki í dag.

Nú minna nógvir skúlaendar um tað reina karneval, og meðan næmingarnir í Hoydølum í fleiri ár hava gjørt nógv burtur úr, millum annað við at steðga ferðsluni, so hava fólkaskúlarnir hildið seg eitt sindur meiri kúrrar. Men eisini tað er við at broytast.

Kommunuskúlin í Havn er ein teirra, sum gera nógv burtur úr. Myndamaðurin hjá Sosialinum var framvið í morgun og tók fleiri myndir av børnum, sum hugnaðu sær við at tveita vátar svampar eftir offrum í »gapistokki«, negldu seym, kappaðust í posarenning, kastispøl og andlitsmáling.

Jens Kristian Vang tók hesar myndirnar.







# Livar aftur til árarnar

Klolkkan 17.30 í gjár fóru teir aftur til árarnar umborð á Artemis Investments, har Livar Nysted úr Hvannasundi er ein av manningini.

Teir løgdu frá landi umleið klokkan hálvgum seks í gjárkvøldið, eftir at hava bíðað sera leingi eftir líkinda veðri til túrin tvørtur um Atlantshavið.

Ætlanin hjá Livari Nysted og teimum umborð á Artemis Investments er at rógva



úr Liberty Harbour í New York, til Bishops Rock við Scillyoyggjarnar - ein teinur upp á 5214 kilometrar - og at gera tað upp á minni enn 55 dagar, sum er 114 ára gamla metið.

Tá 13 og ein hálvur tími vóru farnir, høvdu teir róð 75 kilometrar - sum er á einari heilt góðari leið. 100 kilometrar um døgnið verður mett at verða gott hjá teimum.